Brian Nicholls, deildarleiðari í danska sosialmálaráðnum:

Føroyingar ikki hildið avtaluna!

Hóast bæði fíggjarnevnd og landsstýrið lovaðu donsku myndugleikunum at fleiri fólk og pengar skuldu setast av til at fáa greiðu á teimum ymsu viðurskiftunum á Almannastovuni og í Tinganesi í sambandi við virksemið á Almannastovuni, so varð hetta ikki gjørt. Og hetta er eitt tað mest álvarsliga brotið, sum gjørt varð á ta avtalu, sum føroyingar og danir gjørdu í november í fjør. Sambært hesi avtalu skuldu føroyingar fáa rættlag í viðurskiftini innan 1. apríl.

Hetta sigur Brian Nicholls, deildarleiðari í danska sosialmálaráðnum í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin. Hann avsannar tíðindini í 14. September, at danir hava kravt, at høvd skuldu rulla í Føroyum sum ein avleiðing av frágreiðingini frá landsgrannskoðararnum.

!4. September skrivar í gjár, at danskir myndugleikar hava kravt, at frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum um Almannastovuna skuldi fáa ta avleiðing, at høvd skuldu rulla.

Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við Brian Nicholls, deildarleiðara í danska sosialmálaráðnum. Hann sigur, at danir hava eingi slík krøv sett. Ábyrgdin í hesum máli liggur í Føroyum.

Ananrs hava donsku myndugleikarnir hava vent sær til landsstýrið og biðið um tess viðmerkingar til málið fyri at vita, um tað, sum landsgrannskoðararnir skriva, er rætt.

Avleiðing fyri onkran

-Er tú kløkkur av at frætta, at almannastjórin hevur sagt seg úr starvi sum ein avleiðing av hesi frágreiðingini.

-Um tað er soleiðis, at alt tað, sum landsgrannskoðarin hevur skrivað, er sætt, so eri eg ikki kløkkur av, at hetta kann fáa avleiðingar fyri onkran. Men eg havi onga meining um hvønn.

Brian Nicholls sigur víðari, at tað er ikki nýtt fyri sær, at nakað grundleggjandi skeivt er onkunstaðni í hesum málinum.

Hvat heldur Brian Nicholls so sjálvur um frágreiðingina frá landsgrannskoðaranum - hvør hevur ábyrgdina av støðuni!

Ábyrgdi n

-Ábyrgdin liggur nógva staðni. Hon snýr seg um stýring og starvsfólk í landsstýrinum ogsíðani um eina ótrúliga rúgua av rótarii í tí dagliga eitt nú viðvíkjandi eftirliti og EDV.

-Tað hoyrist, at Almannastovan fleiri ferðir hevur gjørt vart við ótolandi støðuna, og um so er, at Almannastovan fleiri ferðir hevur gjørt vart við manglandi resursir og reglugerðir, liggur tá ikki ábyrgdin av støðuni hjá politikarunum?

-Jú - um tann pástandurin er rættur, men tað havi eg onga meining um.

Brian Nicholls leggur tó aftrat, at einhvør leiðari í eini og hvørjari fyrisiting skal reka eina umsiting á lógligan hátt. -Tú kanst ikki skylda uppá, at tú ikki hevur resursir. Men um resursumangul hevur verið orsøk til nakað ólógligt í fyrisitingini veit eg ikki nóg nógv um.

Hjálpa

-Men tað verður eisini víst á, at arbeiði er so torført, tí tað mangla lógir og reglur at ganga eftir!

-Tað er rætt. Eg havi sjálvur verið í Føroyum fleiri ferðir fyri at fáa ymsar avtalur gjørdar. Nakað av tí, sum manglar eru nógvar rættarreglar og kunngerðir og hava vit tí frá sosialmálaráðnum verið við til at hjálpa landsstýrinum við hesum.

Brian Nicholls sigur víðari, at teir enn hava fólk í Føroym, sum arbeiða við umleið 30 kunngerðum. Hesar eru um at vera lidnar og skulu skjótt leggjast fyri landsstýrið.

-Men hetta er bert nakað av tí, sum ikki er komið upp á pláss. Aftrat koma so øll tey innanhýsis viðurskiftini á Almannastovuni, sum tað fer nógvar nógvar mánaðir at fáa í rætt lag.

-Men um tað tekur so drúgva tíð at fáa hesi viðurskifti uppá pláss, hví fær forsætisráðharrin so at vita í januar, at hesi tingini koma uppá pláss áðrenn 1. apríl?

Brian Nicholls vísir her til tað svarið, sum danski forsætisráðharin 28. februar hevur latið politisku og fíggjarligu nevndini í fólkatinginum.

Har skrivar hann í sambandi við úttalilsi síni í fólkaatinginum, tá uppskot frá framburðsflokkinum var til viðgerðar:

"I det indlæg var udtalelserne om kontrolforanstaltningerne, der byggede på de oplysninger, der forelå for mig, ikke dækkende, tiltrods for at dette burde have været tilfældet, ikke minst efter de aftaler der er indgået mellem den danske sosialminister og landsstýret"

Avtalur halda ikki

-Men hvør hevur so ábyrgdina av, at hann ikki hevur fingið ta røttu og neyðugu vitanina?

-Tað mugu tit spyrja forsætismálaráðið um. Eg veit bert, at vit her í húsinum hava havt fundir við landsstýrið og Almannastovuna og hava gjørt fleiri avtalur. Nú sigur landsgrannskoðarin so, at hesar avtalur halda ikki.

-Men vóru tær avtalur, sum føroyskir myndugleikar og tit gjørdu og sum vóru grundarlagið undir úttalilsunum hjá forsætisráðharranum ikki alt ov bjartskygdar?

-Nei, tað haldi eg ikki.

-Men var tað ikki órealistiskt av føroyingum og sosialmálaráðnum at lova forsætisráðharranum, at alt hetta skuldi vera klárt til 1. apríl.

-Tað haldi eg so avgjørt ikki. Vit tosaðu um hetta longu í september í 1992, tá vit vitjaðu í Føroyum.

Fólk ikki sett

-Men skuldi alt hetta verða avgreitt innan fyri so stutta tíð, átti so ikki at verið sett nógv fleiri fólk av til at fáa hetta frá hondini?

-Tað er greitt, og tað var nettup ein av avtalunum við landsstýrið.

-Men eru ikki resursir settar av til hetta av føroyskum myndugleikum?

-Nei, og tað er ein av avtalunum, sum ikki er hildin.

-Men hvør skuldi seta fólk til hetta arbeiðið?

-Tað skuldi landsstýrið.

Brian Nicholls viðgongur, at júst hetta er ein høvuðstrupulleikunum í øllum hesum málinum.

-Vóru resursir settar av til hetta arbeiði í á heysti í 92, so hevði tað kunnað verið klárt til í vár. Vit søgdu frá í einum tíðindaskrivi í heyst, at vit ætlaðu at vitja í Føroyum til várs fyri at fáa vissu fyri, um hetta var klárt.

Góð tíð

-Men hví hevur ein so forlovað seg til 1. apríl. Hevði tað ikki verið rætt at greitt forsætisráðharranum, at hetta kláraði ein ikki til 1. apríl, og at tað tí hevði verið meira realistiskt at brúkt meiri tíð?

-Nei. Tá vit vóru í Føroyum í september í 1992 hevði eg m.a. fund við formannin í fíggjarnevndini. Hann lovaði mær at fáa tær neyðugu resursurnar til vega. Seinni fingu vit eisini bræv frá fíggjarnevndini um, at resursir fóru at verða settar av, soleiðis at umrødda arbeiði kundi verða gjørt til ásettu tíð. Tí høvdu vit góða grund til at trúgva, at hesi nýggju fólkini fóru at verða sett til at loysa uppgávurnar. Vit vóru tí sera ovfarnir, tá landsgrannskoðarin í februar sigur, at hesi fólkini eru ikki sett.

Brian Nicholls viðgongur, at størv eru lýst leys á Almannastovuni, men talan var eisini um at seta fleiri fólk í landsstýrinum at arbeiða við hesum, og tey eru ikki sett.

-Tað er eitt forsømilisi, at fólk ikki eru sett, og tað er tí ein av avtalunum, sum føroyingar ikki hava hildið.

jan



Jyllands-Posten

VEJRET, 1. SEKTION, SIDE 1

- for hele landet

Færøernes rod fortsætter

AF OLAV CHRISTENSEN

Færøerne har ikke fået styr på den lemfældige udbetaling af sociale ydelser, som var aftalt med den danske regering.

Føroyar eru nú aftur á forsíðunum í donskum bløðum. Og tað er ikki fyri tað góða. Henda greinin stóð á forsíðuni í blaðnum í gjár.

KUNNGERÐ

nr. 42 frá 24. februar 1993
frá
Líkningarráð Føroya

Við heimild í paragr. 33, nr. 1c í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum hevur Líkningarráð Føroya ásett rentuna fyri javnaðan eginpening hjá partafeløgum, lutafeløgum og øðrum skattskyldugum feløgum at nýta í sambandi við mótrokning av rentuinntøku í rentuútreiðslum felagsins til 9%.

Rentan uppá 9% verður at galda fyri roknskaparskeið sum fellur saman við ella endar í 1992.

Tórshavn, tann 24. februar 1993
Líkningarráð Føroya